## Liðið hjá Stóra gjørdi megnar comeback

Tá ið 10 minuttir vóru eftir av dystinum hjá Køge ímóti Brabrand í donsku 1. deild í gjár, vóru eingi útlit til, at liðið hjá Henrik Larsen skuldi fáa nakað stig burturúr. Braband var á odda 2-0, og Køge hevði einki mál fingið hóast nógvar royndir. Men so eksploderaði heimaliðið og skoraði trý mál seinastu 10 minuttir, og hvørja ferð var tað Dennis Bo Mortensen, sum skoraði. Harvið vendi alt upp og niður eftir lítlari løtu, og Køge vann 3-2.



## Dani spælir harðast í Noregi

Hagtøl fyri norsku tippuliguna vísa, at ein danskur fótbóltsspælari er mest revsaður av dómarunum í hesum kappingarárinum. Jan Michaelsen, sum áður hevur spælt fyri Panathinaikos, hevur fingið átta gul kort í 17 dystum fyri HamKam í ár, og tað er tað mesta av øllum spælarunum í deildini.

– Eg spæli fyri liðið, og eg geri ongantíð eina takkling fyri at skaða ein spælara, sigur Jan Michaelsen við norska sjónvarpið.

Eitt av gulu kortunum fekk Jan Michaelsen fyri at brúka seg, og hann heldur, at tað er einasta býtta kortið, hann hevur fingið í ár.

## Vit høvdu uppiborið meiri

Tað var ein vónbrotin Andy Olsen, sum Sosialurin fekk orðið á eftir dystin móti B36 í gjár.

– Eg eri rættiliga skuffaður av, at tað ikki eydnast okkum at fáa meiri burtur úr í dag. Vit skapa nóg mikið av møguleikum til at vinna dystin, og vit høvdu eisini uppiborið meira enn vit fingu, heldur einsamalli málskjúttin hjá runavíkingum.

Tað munnu eisini vera tey allar flestu sum eru samd í tí, at skuldi ein vinnari partú finnast við Løkin, so hevði tað ikki verið óuppiborið, um tað varð NSÍ.

## Vit eru bara nøgdir

Fimm broytingar vóru á liðnum hjá B36 í mun til hálvfinaludystin móti EB/Streymi mikukvøldið. Mikkjal Thomassen og Alex dos Santos vóru báðir úti við leikbanni, og síðani vóru Herbert í Lon Jacobsen, Bergur Midjord og Hanus Thorleifsson allir úti við skaðum. Hetta gav pláss fyri nýggjum andlitum, og ein teirra, sum annars ikki hevur spælt so nógv í ár, men byrjaði inni sunnudagin, var Bogi Hermanssen.

– Jú, tað var deiligt at vera við aftur. Hetta er fyrsti dysturin, eg byrji inni í ár, og hetta er eisini hægri støðið enn tað, eg havi spælt á í ár, sigur Bogi Hermanssen.

Ungu leikararnir stóðu seg eisini væl, og Bogi er nøgdur við, at lið hansara fekk javnleik.

– Um vit hugsa um, hvussu nógvar mans vit máttu vera fyri uttan, og soleiðis sum dysturin annars tók seg út, so eru vit bara nøgdir við úrslitið.

NSÍ – B36 1-1 (0-0):

# B36 helt tørn

NSÍ

B36



*NSÍ hevði munin í dystinum ímóti B36 í gjár, men tað endaði við javnleiki, sum havnaliðið var væl nøgt við*

**Dysturin frá mikudegnum sat eftir í beinunum á gestunum, men runavíkingar vóru ikki nóg raskir at gera sær dælt av hesi støðuni. NSÍ var omaná og høvdu eisini møguleikarnar til fleiri mál, men fingu bara tað eina. Tað fekk B36 eisini og so endaði tað javnt**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

NSÍ hevði møguleikan at leggja seg undir liðina á B36, um teir vunnu sunnudagin, og harvið av álvara hótta teir í heiðursmerkjastríðnum. Tað megnaðu teir ikki, og nú eru teirra møguleikar til fáa medalju rættiliga avmarkaðir, fyri ikki at siga burtur.

Men NSÍ hevði sínar kjansir til mál, og vóru til tíðir óhepnir, at lagnan ikki var teimum mildari við Løkin í gjár.

### Vóru troyttir

Tað sást nokkso skjótt, at tað vóru nakrir troyttir gestir, sum komu á vøllin. Ikki so at skilja, at menn ikki kempaðu og stríddust sum vant, men tað var yvirhøvur ikki sama flog yvir B36, sum til seinnu hálvfinaluna undanfarna mikudag.

Hóast NSÍ hevði bóltin meiri, so fekk B36 tó tveir heilt hampiliga kjansir í fyrra hálvleiki. Teir raktu tó ongantíð málið, og tað gjørdi NSÍ heldur ikki, so liðini fóru í hálvleik uttan at skora.

NSÍ var tó rættiliga nær við ta einu ferðina, tá dysturin er áleið 20 minuttir gamal. Christian Høgni Jacobsen rakar tá stongina, eftir eitt fínt innlegg frá Helga L. Petersen.

### Eitt í part

Miðskeiðis í seinna hálvleiki skoraði Andy Olsen fyri NSÍ. Áðrenn tað hevði tað leikað rímiliga javnt á.

Málið var í sjálvum sær gott, men uppspælið var rættiliga tilvildarligt. Christian Høgni Jacobsen fór upp í høgru síðu og leggur inn til Óla Hansen. Hesin skal til at skjóta bóltin, men fer fullkomiliga skeivur og fær onkursvegna lagt bóltin aftur um seg í skotroyndini. Men rakti Óli Hansen ikki bóltin, so rakar Andy Olsen hann sera væl, og á brotsteigarmarkinum setir hann bóltin í netið.

Tað hevði helst ikki verið óuppiborið, um dysturin endaði 1-0 til NSÍ, men tað gjørdi hann ikki.

B36 megnaði at svara aftur við máli frá Sylla. Tað var í einum kontra álopið, at Fróði Benjaminsen spældi Sylla, sum so royndi seg úti frá. Jens Martin Knudsen bjargaði tó væl í fyrstu atløgu, men Sylla var raskur at fylgja upp og beindi hann returin í netið til javnleik 1-1.

Hetta úrslitið helt sær restina av dystinum, og gjørdist tað eisini endaliga úrslitið. NSÍ hevði tó sínar møguleikar at avgera, og millum annað Christian Høgni Jacobsen meiri enn óheppin, tá hann eftir at hava sett fleiri B36-arar av inni í sjálvum brotsteiginum, slapp at standa púra leysur, men setti skotið við síðuna av málinum, og so endaði tað við javnleiki.

### Kappast við KÍ

Í Runavík hava tey í ár ásanna, at tað í mangar mátar ikki hevur gingið sum ætlað hjá teimum. Í so máta var dysturin móti B36 bara enn ein staðfesting av hesum. Vónirnar at vinna FM vóru góðar við kappingarársbyrjan, men nú teir liggja á einum fimta plássi verður meiri enn trupult at røkka bara bronsuni.

Heldur ikki í B36 eru tey heilt nøgd við kappingarárið, men tað kann enn bjargast, við at vinna steypakappingina. Bronsuna stríðast teir um við KÍ, sum teir bara eru eittans stigið framman fyri, og júst KÍ er eisini mótstøðuliðið í steypafinaluni.